HVÍLDARHEIMIÐ NAINA

Tórshavn t. 29.04.2021.

**<u>Viðtøkur fyri Hvíldarheimið Naina.</u>**

Í samband við nýggju Vælferðarlógina, sum kom í gildi 01.01.2021 blivu viðtøkurnar broyttar og eru tí uppsettar av nýggjum.

§1.

Hvíldarheimið "Naina" er ein sjálveigandi stovnur, sum verður umsitin av eini 5-manna nevnd/stýrið. Stýrið velur ein formann/kvinnu, ein næstformann/kvinnu og ein kassameistara/bókhaldara. Bókhaldarin kann verða við á fundinum, tó uttan atkvøðurætt, og hann kann skriva undir vegna stýrið.

Hesi økið hava umboðað stýrið:

1. Amtslæknin í Føroyum
2. Formaðurin fyri Meginfelagið fyri føroysku sjúkrakassarnarí Føroyum
3. Formaðurin fyri Føroya Løgting
4. Formaðurin fyri Tórshavnar Býráð
5. 1-2 limir, sum tá ið heimið varð stovnað, vóru valdir av skiftisstjórunum í búnum efti Nainu Scharlu Nielsen. Hesir limir hava síðani valt sínar eftirfylgjarar, tá ið teir eru farnir úr stýrinum so hvørt.

Í løtuni verður stýrið mannað við umboðum frá:

1. Kommunulæknafelagnum
2. Heilsutrygd
3. Heilsumálaráðnum
4. Borgarstjórin fyri Tórshavnar Býráð
5. 1 valdur limur: Marjun í Kálvalíð prestur og forkvinna

Stýrið hevur fund so oftani, sum formaðurin heldur tað er neyðugt, og kann verða hildin, um í minsta lagið 2 stýrislimir ynskja tað. Avgerð verður tikin eftir atkvøðufleirtali. Um atkvøðurnar eru javnar, verður atkvøðan hjá formanninum/kvinnuni avgerðandi.

Eksternur grannskoðari grannskoðar rokniskapin á Hvíldarheiminum Naina.

§2.

*"Heimið er ætlað fólkum í Føroyum, sum aftaná sjúku ella av øðrum grundum tørva hvíld fyri at koma fyri seg aftur.*
*Framíhjárætt hava fólk, sum verða útskrivaði frá sjúkrahúsum og sum eftir lækniligari meting tørva uppihald á Hvíldarheiminum.*
*Um pláss er, kunnu eisini onnur upptakast á heimið samsvarandi treytunum í hesum viðtøkunum"*

§3.

Viðvíkjandi gjald fyri uppihald á Hvíldarheiminum Naina vísa vit til lógina um eftirbatarheim:

*"Lógargrundarlagið undir Hvíldarheiminum Nainu er Ll. nr. 18 frá 9. apríl 1964 um raksturin hjá Hvíldarheiminum Nainu, ið ásetur, at "landskassin letur árliga studning við játtan á fíggjarlógini". Írestandi útreiðslur gjalda kommunurnar."*

Í ávísingarseðlunum frá læknunum er ynski framvegis at tað verður viðmerkt, hvar hvíldarheimsfólkini koma frá og hvør orsøkin er til uppihaldið, soleiðis at dátur eru um hesi viðurskifti í mun til skráseting í mun til tørv, bæði í mun til heilsustøðu, og landafrøðiliga og í mun til kommunugjaldið.

§4.

Heilivágur verður útvegaður fyri egna rokning til hvíldarheimsfólkini.

§5.

Fyri at fáa pláss á heiminum er neyðugt at fáa ein læknaváttan til vega, sum ikki er eldri enn 14 dagar. Tey fólkini, sum ikki koma beinleiðis av sjúkrahúsinum, skulu syrgja fyri, at læknaváttan er komin heiminum í hendi, áðrenn teir koma á heimið.

§6.

Hvíldarheimsfólkini skulu, tá teir koma á heimið, hava við sær vanlig gerandisklæðir, útgerð til at halda persónligt reinføri og egnan heilivág. Klæðini hjá búfólkunum verða vanliga ikki vaskaði á heiminum.

§7.

So leingi hvíldarehimsfólkið er á heiminum, er hann/hon undir teimum galdandi ásetingunum/leiðreglunum, sum standa í viðtøkunum, og sum eru kunngjørdir í einum skrivi, sum hongur á hørjum kamari. Verða hesar leiðreglur ikki fylgdar, kann hvíldarheimsfólkið verða víst av heiminum.

Skaði, sum er framdur við vilja ella av grovum ósketni, á ogn í heiminum og á innbúgvi, verður endurgoldin av sjúklinginum eftir avgerð hjá Stýrinum.

§8.

Hvíldrheimsfólkið verður útskrivað eftir áheitan frá fyristøðukvinnuni/læknanum ella hvíldarheimsfólkinum sjálvum. Til ber at fáa uppihald á heiminum í 2-4 vikur – hetta kann tó í heilt serligum støðum verða longt 1-2 vikur, men tá skulu fyristøðukvinna og lækni hava serliga grundgeving fyri at játta hesum. Uppsøgn skal verða við í minsta lagi 2 daga varningi.
Hevur eitt hvíldarheimsfólk orsøk til at kæra um viðgerð á heiminum, kann munnlig ella skrivlig kæra verða løgd fyri formannin/kvinnuna í Stýrinum, sum ger neyðugu kanningarnar og fyriskipanirnar í málinum.

§9.

Stýrið tekur nærri avgerð um ta dagligu leiðsluna á heiminum.

Til góðkenningar frá stýrinum, Tórshavn t. 26.05.2021:

Marjun í Kálvalíð, forkvinna

Turid Arge, næstforkvinna

Egil á Bø, stýrislimur

Marjus Dam, stýrislimur

Heðin Mortensen, stýrislimur